Kjak

Pætur Háberg

Skrivstovumaðurin í FF:

# Hvussu kann slíkt bera til í Føroyum?

Vit meta tað sum eina sjálvfylgju, at vit øll geva hvørjum øðrum eina mannsømiliga viðferð. Hetta skuldi ikki minst verið galdandi fyri fakfeløg. Hetta er sjálvsagt eisini galdandi við uppsøgn, uttan mun til hvør orsøk kann vera fyri henni. Sjálvt hjá "kapitalistiskum" fyritøkum verður ásannað, at ein uppsøgn í sær sjálvum er nóg hart fyri tann, sum missir arbeiðið. Tí verður ómakur gjørdur fyri, at hon skal vera so lítið skaðilig fyri tann uppsagda sum gjørligt.

### Skuldi skaðast mest gjørligt

Men í fjør heyst sóu vit eina uppsøgn júst í einum fakfelag, har endamálið var at skaða viðkomandi mest gjørligt.

Fyrst við eini ólógliga burturvísing uttan uppsagnarløn. Hesa burturvísing varð felagið kroyst til at taka aftur, tá ið málið kom alment fram.

Málið **kundi** enda her við at skrivstovumaðurin fekk tilsøgn um sína lógarásettu uppsagnarløn. So hevði ikki meira hent.

Men so lætt skuldi maðurin ikki sleppa. Nú fekk hann eina eyðmýkjandi uppsøgn.

Hetta var heldur ikki nóg mikið hjá hesum fakfelag. Teir gera tað óhoyrda, at senda út eitt tíðindaskriv, har skrivstovumaðurin alment verður lagdur undir "grovt tænastubrot," sum annars er høvuðsgrundgevingin í uppsøgnini, men sum einki verður sagt um í burturvísingini. Hetta tíðindaskriv avdúkar meira enn annað ta ræðuligu muru í hesum fólkum.

Í uppsøgnini var tann óhoyrda treytin sett fyri at fáa uppsagnarløn, at skrivstovumaðurin fær álagt "loyalietskyldu" móti felagnum í uppsagnartíðini. Hetta kundi væl fatast sum munnkurv, so hann heldur ikki skuldi fáa vart seg alment móti følsku ákæruni í uppsøgnini.

Umrødda "tænastubrot" skuldi vera medvirkan til samb. formannin eitt "Watergate innbrot" á hansara skrivstovu 3. februar 2007 við tí endamáli at beina fyri tilfari í teldu felagsins.

Tað er vitnisfast, at hetta er reinur heilaspuni. Her var bert talan um at undanfarni formaðurin fekk kopi av tí teldutøka tilfari, sum hann sjálvur átti, og skuldi einki verið meira rímiligt enn tað. Har varð so avgjørt einki slettað. <u>Skrivstovumaðurin hevði annars heldur einki við hetta mál at gera!</u>

Men pápabeiggi mín, sum málið snýr seg um, doyði tveir mánaðir seinni. Hetta kom ikki óvæntað. Hann hevði longu tá eina lívshóttandi sjúku, og hann fekk eina viðferð, sum hevði verið nóg mikið fyri ein mann við fullari heilsu. Men við hesum fekk málið eina álvarsliga nýggja vend.

### Bøðilin gjørdi seg til offur

Tey vóru nógv, sum øtaðust um hesa framferð. Tað vóru eisini fleiri, sum gjørdu vart við hetta, eisini alment.

Nú hendir tað margháttliga, at høvuðsmaðurin í hesum máli fer í hernað móti hesum fólkum fyri at teppa tey. Nú roynir hann at gera seg sjálvan og síni til offur fyri sínar egnu gerðir. Bert eitt dømi av fleiri er, at Frank Davidsen hevur alment greitt frá, hvussu formaðurin hótti hann við politi, um hann ikki tók síni sjónarmið aftur.

Men formaðurin man hava ánað, at grundarlagið fyri hansara framferð hevur verið svikaligt.

Nú ger hann tað marghættliga at skipa fyri at leita í telduni hjá frákoyrda skrivstovumanninum, um hann kann finna okkurt meira haldbart at brúka. Formaðurin boðar síðan sínum viðhaldsfólki frá, at nú eru funnin "nýggj prógv," sum skulu rættvísgera hansara framferð móti skrivstovumanninum.

Hetta skuldu vera "prógv" um eina ráðagerð millum fyrrverandi formannin og skrivstovumannin móti sitandi formanni.

Hesi "prógv" verða løgd fram á almennum fiskimannafelagsfundi í Runavík, meðan skrivstovumaðurin lá og stríddist, og átta dagar áðrenn hann andaðist.

Eg hevði í hesum sambandi teldusamskifti við nevndarlim í FF. Hann boðaði mær frá dagin eftir umrødda fund:

***hetta er S.P,harmiligt at tú ikki var vi til fundin í gjár, har limirnir fyngu svar ,og prógv vóru løgd fram.v.h S.P (Orðarætt endurgivið).***

Hesin nevndarlimur gav mær í eini telefonsamrøðu aftaná tilsøgn um at síggja hesi "prógv" á skrivstovu felagsins.

Tá tað ikki lá fyri hjá mær sjálvum, fór systir mín oman á skrivstovu FFs, har hon bað um at sleppa at síggja hesi "prógv".

Men tað slapp hon als ikki, hóast tey longu tá vóru send í hvussu er einum samsintum sóknarformanni hjá FF! Eg veit eisini um púra óviðkomandi fólk, sum hava fingið somu "kunning."

Formaðurin las bert brot úr samskiftinum. Systir mín fekk tískil bert onkrar ábendingar um innihaldið í hesum "prógvum."

Við hesum ábendingum hevur fyrrverandi formaðurin funnið hesi "prógv" fram á síni egnu teldu. Tað snýr seg um tvey teldubrøv frá 2007:

**1.** Teldubræv, har fyrrverandi formaðurin sóknast eftir ladara til teldu sína. Skrivstovumaðurin finnur ikki ladaran og biður undanfarna formann sjálvan koma at leita.

**2.** Teldubræv, har fyrrverandi formaðurin vil hava okkurt ávíst FF-blað, sum skrivstovumaðurin bað hann koma at leita eftir, tí hann fann tey ikki sjálvur.

Hetta eru "prógvini" fyri hesi ráðagerð! Meira meinaleyst kundi tað ikki vera. Hevði málið ikki verið so óhugnaligt, hevði tað verið beinleiðis láturligt.

Tað sigur heldur ikki heilt lítið, at einastu ítøkiligu "prógv" í málinum skal leitast heilt aftur til 2007 at finna. Og so eru tey eisini heilaspuni.

Systir mín varð eisini á skrivstovuni hjá FF løgd undir at "vita ov nógv". Formaðurin hótti við at melda hana, tí "tað nokk var HON, sum hevði brotið inn á teldu hansara fyri tveimum vikum síðani," sum formaðurin sjálvur málbar seg. Nakað tað sama upplivdi Frank Davidsen. Hetta er greið ábending um, at formaðurin líður av eini sjúkligari kenslu fyri forfylging. Tað sama váttar eisini umrødda Watergatesøgan.

Tann seinasta "heilsanin" til tey avvarðandi kom sjálvan 1. desember, sama dag, sum skrivstovumaðurin doyði! Tá visti teir á FF í hvussu er hvussu ógvuliga álvarsom støðan var. Hetta var teldupostur frá einum fiskimanni við tøttum tilknýti til nevndarmeirilutanum í FF. Sína niðurstøðu hevði viðkomandi fingið á umrøddu fundi í Runavík. "Heilsanin" var, at skrivstovumaðurin var sloppin alt ov væl!

### Samsek og Samtak

Tað eru fleiri, sum so ella so eiga part í hesum máli. Fyrst var eingin trupulleiki at fáa nóg mikið av nevndarlimum í FF at taka undir við hesi ógerð móti manni, sum teir hava kent persónliga og sitið væl saman við í upp til 10-tals ár uttan at hava nakað at finnast at honum.

Tað var heldur eingin trupulleiki at fáa løgfrøði til at medvirka til at skaða skrivstovumannin mest møguligt í umrøddu uppsøgn. Skrivstovumaðurin fekk enntá frátikið sín upplagda rætt svara ta grovu skuldsetingini um "tænastubrot," sum tað annars var øll grund at ivast í.

Ein serligan leiklut hevur samskiparin fyri Samtak, sum váttaði alment fyri Degi og Viku, at hon stuðlaði hesi framferð.

Í Sosialinum 29. november, so stutt sum tveir dagar áðrenn skrivstovumaðurin andaðist, sigur samskiparin seg enntá hava "fingið eina nøktandi frágreiðing frá Fiskimannafelagnum um málið og hevur tikið hana til eftirtektar og hevur annars onga meining um málið."

Nú skrivstovumaðurin ikki fekk møguleika at spyrja, kundu vit avvarðandi havt hesar spurningar:

Hvør frágreiðing er so nøktandi fyri samskiparan, at hon kann rættvísgera eina slíka viðferð av einum medmenniskja? Teir táverandi heiðurligu nevndarlimirnir í FF fingu so avgjørt onga nøktandi frágreiðing.

Hvussu kann ein frágreiðing, sum kundi merkja lív og heilsu fyri ein persón, vera nøktandi, tá ið tann ákærdi ikki fekk møguleika at svara fyri seg?

Hví skal samskiparin hava eina frágreiðing um eitt mál, sum hon onga meining hevur um?

Og hvussu kann samskiparin stuðla eini mannagongd, sum hon onga meining hevur um?

Hvussu kann hon onga meining hava um eitt mál, tá hon visti, tá hon seinast tosaði við Sosialin um hetta mál, at tað hevði oyðilagt lívið hjá einum medmenniskja?

Hvat skal til, fyri at samskiparin skal hava eina meining um viðferðina av einum medmenniskja? Valdast tað hvør tað er?

Hvussu kann samskiparin so seint sum 29. november enn eina ferð stuðla umrøddu mannagongd við at siga seg hava fingið eina "nøktandi" frágreiðing, tá ið tað er víst á alment, at talan er um ósannindi?

Katrin, systir mín, bað fleiri ferðir um at sleppa á tal við samskiparan, so hon í hvussu kundi fáa javnvág í síni kunning. Men samskiparin noktaði at hitta hana!

Tað er eingin ivi um, at so væl løgfrøðin sum samskiparin høvdu, um tað var nøkur rættvísiskensla skapt í teimum, kunnað forðað ella í minsta lagi í stóran mun kunnað avmarka tann skaða, sum gjørdur varð skrivstovumanninum og harvið eisini hansara avvarðandi. Men tað var øvugt!

Her er í hvussu er skrivað føroysk fakfelagssøga, og tað við lít.

### Mannagongdin blástemplað av Degi og Viku

Dagur og Vika lýsti frá byrjan málið á ein virðiligan hátt. Úrslitið var tað, at formaðurin á Facebook legði sjónvarpið undir at renna ørindini fyri starvsfólk, sum høvdu tilknýti til skrivstovumannin!

Nú hendir tað heilt merkiligt, at formaðurin fær seinasta orðið í hesum tíðindaflutningi.

Hetta hendi í samband við, at almennu fakfeløgini høvdu sent eitt "dult" bræv til FF, har tey átalaðu mannagongdina í málinum.

Hetta førdi til upplestur av einum telduposti til fakfeløgini, sum talaðu at hesi høpisleyu framferð. Soleiðis byrjar brævið frá formanninum.

*"Lat meg gera púra greitt, at eingin er meir harmur um málið enn eg og vildi eg, at tey tiltøk í vórðu sett í verk vóru óneyðug."*

Hesa svadu góðtók D&V uttan spurning ella viðmerking sum eina nóg góða undanførslu fyri hesi "tiltøk", sum ikki hava sæð sín líka fyrr her á landi. Tískil er mannagongd sum henda eisini blástemplað av almennu føroysku tíðindatænastuni. Tað hevði verið lætt at avdúka, hvussu lítið grundarlag var fyri hesi fráboðan. Men fólk, sum høvdu fylgt við málinum, vórðu ikki spurd.

Tað er sanniliga munur á, tá tað eru politikarar, sum ikki eru í krithúsinum. Teir verða náðileyst tráspurdir um viðurskifti, sum hava nógv minni uppá seg enn hetta.

Sosialurin royndi at fáa samskiparan fram í ljósið. Men hesum slapp hon undan við at tiga seg burtur úr tí! Hon bakkar annars ikki fyri at úttala seg um alt tað órættvísi, hon av røttum finnur í samfelagnum. Men hennara rættvísiskensla valdast kanska, hvønn tað snýr seg um, og um tað fær avleiðingar fyri hana at tala at.

### Hvat við fiskimonnum?

Áhugavert er eisini tað, sum ein av bakmonnunum hjá formanninum skrivar í einum telduposti:

"Hóast Jan var ivasamur, tí hann hevur nógvar sjómenn á sínari síðu, sum bakka hann upp í hesum málinum (eg veit ikki hví), so var hann maður fyri at bera fram eina almenna umbering fyri nøkrum døgum síðani."

Til hetta er at siga, at fiskimenn hava bert fingið ósannindini frá formanninum, sum enntá fór umborð á skip við síni søgu, men ikki vildi/tordi at stíga alment fram.

Hetta er annars eisini ein váttan um, at tann ullinta hálva umberingin bert var uppá kvamsvís fyri at bjarga egnum skinni. Hetta vistu vit onnur frammanundan.

### Skuldi verið óhugsandi

Henda søga er nógv ótespuligari, enn her er greitt frá. Nógv av tí, sum er hent í hesum máli er so háttað, at tað ber ikki til at seta á prent, í hvussu er í hesum umfari. Tað atlit skal kortini takast til tey seku í hesum máli!

Men hetta er ein viðferð av einum medmenniskja, sum eingin fyri hálvum ári síðani hevði droymt um kundi henda í Føroyum.

Øll kunnu gera okkurt mistak í sínum arbeiði. Men **einki** kann rættvísgera eina slíkan skipaða herferð móti einum persóni og hansara avvarandi. Hon byrjaði mikkjalsmessudag og stóð uppá til seinasta dagin hjá skrivstovumanninum tveir mánaðir seinni.

Men niðurstøðan er tann, at í Føroyum kann ein slíkur persónur sum hesin formaður leggja støðið hjá fakfeløgum, løgfrøði, tíðindaflutningi umframt samkomu- og politiska leiðslu.

Vit, sum varaðu av Olafi, og øll, sum vóru góð við hann, standa spyrjandi. Olaf er farin og málið hevur verið so órímiligt og órættvíst. Við hesi grein vóni eg at varpa ljós – alment – á tað, sum veruliga er farið fram. Vit hava ongantíð verið bangin fyri at tosa alment um tað, sum er farið fram. Tað var Olaf heldur ikki so leingi hann orkaði. Verri er við lygisøgum í krókunum, sum vit eisini skylda Olafi at afturvísa.

Eg spyrji meg sjálvan: Hvussu kann slíkt henda í hesum paradísinum, sum vit halda Føroyar vera?

Vit síggja, at allir partar hesum ræðuliga máli halda bara áfram í sama stíli, sum um einki er hent. Eru hetta veruliga Føroyar?

***Klaksvík***
***tann 14/03-2011***